# Veitsla og politikkur




"Hevur kærleiki kyn?" spurdu tey í skrúðgonguni

**Í Føroyum eru vit uppdrigin av lokalumhvørvinum og ikki almenna rúminum. Tí tekur tað tíð at broyta ting, men 266 b er bara eitt fet rætta vegin í stríðnum fyri at bøta um viðurskiftini hjá samkyndum, var ein av boðskapunum á Føroya Pride, har politikkur og veitsla gingu hond í hond**

FØROYA PRIDE
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Ólavur Fredriksen*

Føroya Pride er av á hesum sinni. Tiltakið byrjaði seinnapartin fríggjadagin og endaði seinnapartin sunnudagin. Tað, sum savnaði flest fólk á hesum døgum, var skrúðgongan seinnapartin leygardagin. Ein skrúðgonga har hundraðtals hinskynd, samkynd, tvíkynd og transkynd úr øllum norðurlondum gingu lið um lið fyri sama endamáli: nevniliga at bøta um viðurskiftini hjá teimum, ið ikki hava somu seksuellu orientering sum tey flestu.

Breið semja var um, at samtyktin um at skoyta spurningin um kynsliga sannføring uppí grein 266 b í revsilógini, var eitt stórt fet rætta vegin. Hetta framgekk millum annað á fyriskipaða pallborðsfundinum í Norðurlandahúsinum. Eitt sjónarmið sum danski fólkatingslimurin Mogens Jensen framlegði, og sum hini tóku undir við.

– Nú mugu tit taka næsta stigið, men geri tað í hóskandi tempo, vóru ráðini frá framsøgumanninum í miðla- og mentanarmálum hjá socialdemokratunum.

Hini trý sum luttóku til pallborðsfundin vóru svenski politikkarin Johan Tiedemann, tjóðveldismaðurin Finnur Helmsdal og Ásta Ósk Hløðversdóttir, forseti í ANSO, sum er norðurlendski felagsskapurin hjá samkyndum undir útbúgving, ið skipaði fyri Føroya Pride.

Finnur Helmsdal tók undir við Mogens Jensen og segði, at tað fara ting at henda á økinum aftrat, men at tað hvørki verður í dag ella í morgin, sum hann tók til.

– Í Føroyum eru vit uppdrigin av lokalumhvørvinum og ikki almenna rúminum. Tí tekur tað tíð at broyta ting, vísti hann á.

## Ikki komin á mál nakrastaðni

At tað er langt eftir á mál vóru tey samd um til pallborðsfundin, og tað framgekk eisini í røðunum, ið vórðu hildnar seinni um dagin á Vaglinum.

– Men enn eru vit ikki komin á mál nakrastaðni. Tað er tó ymiskt hvussu langt er eftir frá landi til land, staðfesti Mogens Jensen uppi í Norðurlandahúsinum. Hvat er so málið hvørki ein hóskandi spurt. Svarið er ikki einfalt, men heilt stutt er tað, at samkynd fáa neyvt somu rættindi eins og hinskynd. Tað vil siga, at samkynd til dømis skulu hava loyvi at ættleiða børn ella fáa kunstiga ísáðing.

Hetta fekk Ástu Ósk Hløðversdóttir at vísa á, at júst tí eru tiltøk sum Føroya Pride týdningarmikil.

– Tey halda lív í kjakinum, og soleiðis verða ting so líðandi broytt, segði hon.

Pallborðsfundurin var fínur sum upplýsandi tiltak, men tað er synd at siga, at nakað kollveltandi nýtt kom undan kavi.

## Mær dámar menn

Eftir pallborðsfundin, tað vil siga klokkan 14, vóru fólk savnað uttanfyri Norðurlandahúsið; klár at ganga skrúgongu oman í býin, har røður og tónleikur vóru á skránni. Taka vit tónleikin fyrst, so var tað Finnur Jensen, sum stóð fyri hesum. Og hann dugdi bæði at syngja og undirhalda. Serliga tá hann kom til sangin "Eg", fekk hann fólk at flenna. Sangurin er best kendur fyri niðurlagið "Mær dámar menn...", og snýr hann seg um ein samkyndan mann, sum bíðar eftir tí einasta eina. Finnur viðgekk eisini, at tá hann